# Aðalorðaskifti um bygnaðin av fiskivinnu á landi



*Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, fær her frágreiðingina um bygnaðin í fiskivinnuni á landi handaða*

*Mynd: Jens K. Vang*

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, fer at leggja frágreiðingina um bygnaðin av fiskivinnu á landi fyri á fyrstkomandi landsstýrisfundi

Bjarni Djurholm fekk frágreiðingina handaða í Sjó- og vektarbúðini hósdagin. Frágreiðingin snýr seg sum sagt um bygnaðin av fiskivinnuni á landi. Og hetta er eitt mál, sum landsstýrismaðurin fer at leggja fram á landsstýrisfundi.

– Eg fari at skjóta upp, at frágreiðingin verður nýtt sum grundarlag fyri einum aðalorðaskifti á tingi, sigur Bjarni Djurholm, sum vísir á, at tað hava verið aðalorðaskifti um fleiri ymisk mál, men ongantíð hetta.

– Hetta er eitt sera týdningarmikið mál, so eg taki tað sum givið, at tað verður eitt orðaskifti um tað, slær landsstýrismaðurin í vinnumálum fast.

Tá Sosialurin fekk orðið á landsstýrismannin, var hann staddur á tingfundi. Hann hevði ikki lisið frágreiðingina, men hann segði, at hann hevði blaðað hana ígjøgnum. Har hevði hann millum annað bitið merki í, at teir spurningarnir, sum hann hevði sett, sóu út til at vera sera greitt svaraðir.

Far á flog...
Frá 16. januar til 28. mars 2003 ber til at ferðast bíliga til Danmarkar og aftur. Ferðin kann vara í mesta lagi 4 dagar. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tínari ferðaskrivstovu ella á www.maersk-air.dk
Føroyar - Keypmannahavn og aftur* Prísir frá 1860,- fyri hvønn, íroknað ferðaavgjald
Føroyar - Billund og aftur* Prísir frá 1860,- fyri hvønn, íroknað ferðaavgjald
MAERSK AIR
It's got to be perfect

Heinta tíni egnu brúkarabúmerki ...
... tey kunnu fáast við at senda fyrispurning beinleiðis gjøgnum fartelefonina á tel 1441 og viðmerkja TT logo [stuttboð].
Brúkarabúmerki
Myndaboð
Ringitónar
planet.fo
FØROYA TELE

Hava tygum tørv á einum bili í nakrar tímar, dagar ella longur, er skilagott at leiga, heldur enn eiga!
Setið tygum í samband við okkum, tað loysir segl!
AVIS BILÚTLEIGAN
Staravegur 1, Tórshavn, tlf. 217 535 / 313 535
Flogvøllurin: tlf. 212 765 /358 800
Teldupostur: avis@post.olivant.fo

<ph_1>
<ph_1>



# Suðuroyingar gjørt heimaarbeiðið

**Fólkafloksfólk í Suðuroynni vilja hava tann nýggja landsstýrismannin við fiskivinnumálum. Teir viðganga at teir hava ligið framvið at fingið sessin, men spurningurin er, um Fólkaflokkurin vil satsa upp á Suðuroynna, sum ikki altíð hevur givið flokkinum tær nógvu atkvøðurnar**

POLITIKKUR
*Theodor E. D. Olsen*



*Suðuroyingar ynskja, at ein av teirra oyggjarmonnum fer at ráða fyri borgum inni í Fiskimálaráðnum. Men hini valdømini liggja eisini framvið*

- Vit brúka ta tíðina, sum tað er neyðugt at brúka. Hetta sigur Anfinn Kallsberg. løgmaður, har hann á síðu 3 í blaðnum í dag verður spurdur, hvussu tað gongur at finna tann rætta ella ta røttu, sum skal verða fiskimálaráðharri eftir Jørgen Niclasen.

Tá nýggjur landsstýrismaður skal setast verður ofta sagt, at øll landsfeløgini hjá tí flokkinum, sum eigur sessin, liggja framvið, og ofta hevur felagið hjá Fólkaflokkinum í Suðuroynni gjørt vart við sína ónøgd, tá teirra flokkur hevur valt landsstýrisumboð úr øðrum valdømum.

Jacob Vestergaard, ið er ein av kandidatunum, sum Sosialurin skilir verða bjóðaðir fram, viðgongur, at fólkafloksfólk í Suðuroy aftur hesaferð hava róð framundir, at tey skulu umboða flokkin í Landsstýrinum, men sum hann sigur, so er eingin føst mannagongd, tá flokkurin velur ráðharra, og tí er ikki gott at vita, hvør verður kosin.

Jacob Vestergaard sigur, at tey hava vónað hvørja ferð, nýggjur landsstyrismaður skuldi veljast, og at hetta hevði verið positivt fyri flokkin og teir veljarar í oynni, sum so trúliga hava valt Fólkaflokkin ferð eftir ferð. Men hann leggur aftur at, at hetta er eitt talv við nógvum leikum, sum eingin enn kennir úrslitið av. Kortini hopa fólkafloksfólk í Suðuroy aftur hesaferð til tað seinasta, sigur Jacob Vestergaard.

## Væntaði nýggjan ráðharra í gjár

Knútur Nygaard sigst at vera maðurin í Suðuroynni, sum hevur gjørt tað lobbyarbeiðið, ið suðuroyingar vóna skal til, fyri at teir skulu fáa tann nýggja landsstýrismannin hjá Fólkaflokkinum.

Hann sigur eins og Jacob Vestergaard, at tey hava vónað hvørja ferð, nýtt landsstýri varð mannað, at eitt umboð úr teirra lokalfelag bleiv valt í Tinganes.

Men hesaferð eru vónirnar betri, sigur ein bjartskygdur Knútur Nygaard, ið heldur, at hetta hevði verið ein gularót hjá Fólkaflokkinum í Suðuroynni, sum á undanfarna løgtingsvali einans fekk 424 atkvøður tilsamans. Hann sigur, at tey hava givið flokkinum teirra boð upp á, hvørji eru skikkað at verða komandi fiskimálaráðharri, men viðgongur samstundis, at tað hava hini lokalfeløgini í Føroyum eisini gjørt.

Knútur Nygaard dylur ikki fyri, at hann heldur tað vera snilt av Fólkaflokkinum at velja sær fólk úr Suðuroynni.

- Suðuroyggin er fjórðstørsta valdømi í landinum – størri enn Vágar, Sandoy og Norðstreymoy – og tí mátti tað verið gott »terræn« at dyrka, og tað skal heldur ikki so nógv til at fáa ein umdømisvaldan her suðuri. Vit vóru bert seks atkvøður frá einum løgtingssessi næstseinasta val og hóast skrædl var væntað, so kom tað tó ikki seinast, sigur Knútur Nygaard, sum tá Sosialurin prátaði við hann væntaði, at ein nýggjur landsstýrismaður fór at verða settur í gjár.

- Annars kann løgmaður bíða ein mánaða afturat, sigur Knútur Nygaard og sipar til, um ein nýggjur ráðharri alment verður settur tann fyrsta dagin í ein mánaða.

Í vikuni hevði Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag fund um framtíðina hjá oynna, og sum Sosialuirn skilir, væntaðu fá av umboðunum hjá hinum flokkunum, at Fólkaflokkurin fór at leita sær til Suðuroyar eftir landsstýrismanni hesaferð. Grundgevingin var snøgt sagt tann, at tað tykist ov torført hjá flokkinum at vinna nakran løgtingsess í oynni, og at tað tí ikki vildi verið takstiskt skilagott.

Enn vil Anfinn Kallsberg sum sagt einki siga, hvønn Fólkaflokkurin heldur skal yvirtaka sessin hjá Jørgen Niclasen. Løgmaður brúkar brúka ta tíðina, sum tað er neyðugt at brúka, sigur hann.



Sosialurin

## Bretar vilja ikki hava kríggj

**Í Bretlandi vil fólkið eitt og politiski myndugleikin eitt annað í stríðsspurninginum við Irak**

UTTANLANDS
*Heri á Rógvi*

**London:** Størsta ivamálið í heiminum hesa seinastu tíðina hevur verið, hvørt USA og tess sameindu fara at gera álvara av hóttanunum at leypa á Irak, og byrja eitt kríggj við Sadam Hussein og hansara her. Tað er amerikanski forsetin, ið gongur á odda í stríðnum móti Irak, og hann er fremsti fortalarin fyri hernaðarligum álopi.

George Bush fær stuðul frá nógvum stjórnarleiðarum í Evropa. Ein teirra er bretski forsætisráðharrin, Tony Blair.

Bush og Blair skulu á fund saman um stutta tíð, og tann fundurin verður sagdur at vera sera týðandi fyri, hvør endalig støða verður tikin.

Higartil hevur stuðulin frá Blair til Bush ikki verið at tikið feil av. Munur er tó á Blair og fólkinum.

Seinastu kanningarnar vísa, at stórt fleirital av bretum eru ímóti hernaðarligum álopum á Irak.

Blaðið Daily Mirror, sum sjálvt er hart ímóti hernaðarligu ætlanunum hjá Bush, sigur at teirra kanningar vísa, at millum 75 og 80 prosent av bretum eru ímóti hernaðarligum álopum.

Eisini aðrar kanningar hava víst, at bretar ikki ynskja kríggj.

Støðan hjá meirilutanum av bretum er hin sama sum hjá fólki í nógvum londum í vesturheiminum.

Eisini í Føroyum fara fólk á fundi leygardagin at gera vart við teirra misnøgd. Hesin fundurin verður hildin í Havn.